


*Føroyar vóru um at druknað í valplakatum í seinastu viku, tí valevni úr øllum landinum hongdu plakatir um alt landið. Men plakatirnar sannførdu ikki klaksvíkingar um at velja onnur enn teirra egnu, og kavin og myrkrið kundu í frið og náðum leggja seg yvir vøkru myndirnar*

*Mynd: Høgni Thomsen*

# Norðoyingar valdu síni egnu

**Valdu tinglimirnir úr Norðoyggjum fingu allir dyggan stuðul úr lokala økinum, norðoyingar velja norðoyingar. Tó hava fleiri av fremstu valevnunum dugað at gagnnýtt møguleikarnar í eina valdøminum, og onkur av norðoyatinglimunum hevði ikki komið inn, um hann ikki eisini fekk nógvar atkvøður aðrastaðni**

VALÚRSLIT
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Norðoyingar velja norðoyingar. Tað gjørdu teir í øllum førum til hetta valið. Hóast Føroyar nú eru eitt valdømi, og allir føroyingar høvdu somu 171 valevni at velja ímillum, so vísir valúrslitið, at í øllum førum í Norðoyggjum hildu fólk seg til tey lokalu valevnini.

Í øllum flokkum fingu lokal valevni nógv meira enn helvtina av atkvøðunum og í fleiri flokkum fóru næstan allar atkvøðurnar til lokal fólk. Harumframt fingu valevnini hjá Fólkaflokkinum, Sambandsflokkinum og Miðflokkinum so góðan stuðul lokalt, at tað í sær sjálvum var nokk til ein tingsess, meðan Tjóðveldistingmaðurin slapp í Løgtingið, tí hann eisini fekk dyggan stuðul aðrastaðni. Men úrslitið vísir eisini, at hóast veljarnir í Norðoyggjum ikki eru áhugaðir í valevnum aðrastaðni, so hava valevnini sjálvi dugað væl at útnytta, at landið nú er eitt valdømi. Úrslitið er, at Norðoyggjar fingu fimm tingfólk, og tríggjar kvinnur standa sum annað og triðja varafólk í teirra flokki.

## Lokalt valdir fólkafloksmenn

Fólkaflokkurin hevur traditionelt verið sterkur í Norðoyggjum, og fleiri ferðir hevur flokkurin fingið tveir tinglimir úr Norðoyggjum. Broytingin til eitt valdømi broytti ikki hetta, tí fólk stóðu saman um lokalu valevnini.

Annfinn Kalsberg fær 418 og Jákup Mikkelsen 371 atkvøður úr lokala økinum. Eftir teimum koma fýra lokal fólk við tilsaman 216 atkvøðum. Tað vil siga, at av teim 1143 atkvøðunum, sum Fólkaflokkurin fekk í Norðoyggjum, fóru seks tey fremstu lokalu valevnini avstað við heili 928 atkvøðum.

Ikki fyrr enn á sjeynda plássi kemur ein politikari uttan fyri Norðoyggjar, Jógvan á Lakjuni við 28 atkvøðum, meðan politikarar sum Jacob Vestergaard, Annika Olsen og Jørgen Niclasen einans fingu ávíkavist 18, 13 og 10 atkvøður í Klaksvík.

Anfinn Kallsberg fekk fleiri enn 100 atkvøður úr øðrum økjum og fekk í alt 549 atkvøður, meðan Jákup Mikkelsen fekk í alt 436 atkvøður. Men hjá báðum vóru lokalu atkvøðurnar nóg nógvar í tali til at fáa tingsess.

## Stuðul aðrastaðni avgerandi

Á Tjóveldislistanum er Heini O. Heinesen ein greiður vinnari við 310 atkvøðum. Næst honum eru tvær Klaksvíkskonur, Óluva Klettskarð og Olga Biskupstø, við 123 og 96 atkvøðum. Síðani kemur Høgni Hoydal við 71 atkvøðum, meðan Jákup Petersen, lækni úr Klaksvík fær 34 atkvøður. Fremstu norðoyingarnir fáa soleiðis 563 av teim 688 atkvøðunum hjá Tjóveldi í Norðoyggjum.

Høvdu tær 310 atkvøðurnar verið einastu atkvøðurnar hjá Heina O. Heinesen, hevði hann ligið aftanfyri bæði Páll á Reynatúgvu og síðst valdu tjóðveldistinglimirnir Hergeir Nielsen og Sjúrða Skaale, men við stuðli frá øðrum økjum fær Heini O. Heinesen í alt 415 atkvøður, og kemur inn á ting framman fyri hesar tríggjar.

Og meðan Óluva Klettskarð fær størri undirtøku enn Olga Biskupstø í Norðuroyggjum, so er landsúrslitið umvent, har Olga Biskupstø, forkvinna í útoyggjafelagnum, næstan trífaldar sínar atkvøður til 254 og er triðvaldi tiltakslimur hjá Tjóveldi.

## Rukku ikki inn á ting

Fremst á javnaðarlistanum lógu tvey lokal umboð, Aksel Vilhelmson Johannesen og Eyðgunn Samuelsen við ávíkavist 189 og 167 atkvøðum. Nummar trý og fýra eru eisini úr Norðoyggjum: Mamy Sørensen av Viðareiði við 138 og Tummas J. Lervig við 74 atkvøðum, meðan nummar fimm á listanum er løgmaður, Jóhannes Eidesgaard, við 27 atkvøðunum. Fýra tey fremstu lokalu valevnini fingu sostatt 568 av teim 666 javnaðaratkvøðunum í Norðoyggjum.

Meðan Heini O. Heinesen verður førdur inn á ting við atkvøðum uttan fyri Norðoyggjar, so fáa fremstu umboðini hjá Javnaðarflokkinum ov fáar atkvøður uttan fyri lokaløkið til at tey røkka inn á ting. Eyðgunn Samuelsen, sum er forkvinna í Demokratia og tí eitt kent andlit uttan fyri Norðoyggjar fær færri enn 100 atkvøður frá øðrum økjum, og Aksel Vilhelmson Johannesen fær enn færri atkvøður aðrastaðni. Javnaðarflokkurin hevur sostatt mist ein tinglim í Norðoyggjum. Eyðgunn Samuelsen er tó næsta varafólk hjá Javnaðarflokkinum. Aftur her síggja vit, at stuðulin uttanfyri lokala økið ger munin, tí í Norðoyggjum hevur Eyðgunn færri atkvøður enn Aksel.

## Sambands- og miðflokkatingmann

Sambandsflokkurin hevur ikki havt umboðsvaldan tinglim úr Norðoyggjum í meira enn 50 ár, men hesuferð eydnaðist tað.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, var tann stóru atkvøðuslúkurin hjá Sambandsflokkinum. Flokkurin fekk 604 atkvøður í Norðoyggjum, og av hesum átti Bjørn Kalsø tær 467. Nummar tvey var John Kári Jacobsen úr Hvannasundi við 37 atkvøðum, meðan Magni Laksáfoss, sum er ættaður úr Klaksvík, fekk einans 29, og floksformaðurin Kaj Leo Johannesen fekk 19.

Lokalu atkvøðurnar høvdu verið nokk at givið Bjørn Kallsø løgtingssess, men hann fekk næstan 100 atkvøður uttan fyri Norðoyggjar og endaði tí sum triðvaldi maður hjá Sambandsflokkinum.

Karsten Hansen er tað valevnið í Norðoyggjum, sum hevur dugað best at selt seg uttanfyri økið eisini. Hann fær einsamallur 428 av teim 564 lokalu miðflokkaatkvøðunum, men í alt fær hann 897 atkvøður. Hann fær soleiðis meira enn helvtina av sínum atkvøðum aðrastaðni.

## Ósemja um sjálvstýrisumboð

Lokali stuðulin sást eisini aftur hjá Sjálvsstýrisflokkinum, har fýra tey fremstu valevnini eru lokal, meðan Kári á Rógvi kemur inn sum nummar fimm við 22 atkvøðum.

Meðan hinir flokkarnir antin hava ein ella tveir oddafiskar, so eru atkvøðurnar hjá Sjálvsstýrisflokkinum meira javnt býttar. Á fyrsta plássi er Rúna Siversen við 61 atkvøðum, og tríggir norðoyingar liggja á næstu plássunum við millum 43 og 25 atkvøðum í part. Av teim tilsaman 267 atkvøðunum, sum Sjálvsstýrisflokkurin fær í Klaksvík fara 178 til tey lokalu.

Samlaða atkvøðutalið hjá Rúnu Siversten er 178, og hon er tann einasta á listanum hjá Sjálvsstýrisflokkinum í Norðoyggjum, sum røkkur út um lokala øki. Samstundis er hon einasti politikari úr Norðoyggjum, sum fær størstu undirtøku sína uttanfyri Norðoyggjar. Hóast tað ikki tykist sum, at lokalu sjálvstýrisveljarnir rættiliga hava tikið hana til sín, so fær hon so mikið av stuðli aðrastaðni, at hon er næsti varalimur hjá Sjálvstýrisflokkinum.

Valúrslitið í Norðoyggjum undirstrikar tí, at hóast Føroyar eru eitt valdømi, so hugsa veljarnir framvegis í lokalum valevnum, og hetta er onkursvegna við til at tryggja, at tingmanningin er so geografisk býtt sum hon er. Men tølini kunnu eisini geva eina ábending um, at fólk í Norðoyggjum ikki hava álit á, at fólk úr Havn duga at varða av áhugamálum uttanfyri miðøki.